# Kunning um upptøkuroynd

Tey, sum vilja lesa bachelor í løgfrøði frá heysti 2019, skulu møta til upptøkuroynd leygardagin 29. juni 2019, kl 10-14. Royndin verður hildin á veghæddini á Søgu- og samfelagsdeildini, Jónas Broncksgøtu 25.

Upptøkuroyndin telur, saman við miðnámsprógvi v.m., við í metingini av, hvør er skikkaður til upptøku.

## Endamálið við royndini

Bachelorútbúgvingin er fyrsta grundarlagið undir eini útbúgving, sum týðandi og ábyrgdarfull størv eru knýtt at.

At lesa lóg snýr seg ikki einans um at minnast og duga lógargreinar. Ein fatan av tí søguliga og samfelagsliga høpi, sum lóg og løgfrøði er partur av, er av stórum týdningi. Løgfrøðingurin má hava væl mentar førleikar í løgfrøðiligari greining, løgfrøðiligari hugsan og brúki av løgfrøðiligum grundreglum í síni argumentatión og samskifti.

Útbúgvingarnar í lóg á Fróðskaparsetrinum eru lagaðar til hesa fatan. Kortini er ikki møguligt at leggja hesar fortreytir niður í tey lesandi frá grundini av, men einans at menna víðari tað, sum tey lesandi hava fingið í beinini úr heiminum, vanliga lívinum, miðnámsskúla, lægri skúla ella øðrum viðkomandi útbúgvingum og royndum.

Endamálið við upptøkuroyndini er tískil at kanna, um umsøkjarar hava nøktandi av grundleggjandi førleikum til at mennast víðari á løgfrøðiútbúgvingini.

Umsøkjarar verða ikki mettir eftir teirra vitan um lóg og rættarskipan framman undan — sum útbúgvingin júst er ætlað at menna – men eftir teirra almenna vitanarstøði, evni at greina (analysera) og førleikum í máli og samskifti.

## Um royndina sjálva

Royndin kemur at standa í fýra pørtum.

Fyrst verður ein multiple choice uppgáva við 20 spurningum. Multiple choice uppgávan hevur til endamáls at geva eina mynd av, hvussu sterkur umsøkjarin er í almennari vitan, og serliga, men ikki einans, vitan, ið kann haldast at hava týdning fyri løgfrøðilestur.

Síðan verður ein uppgáva við trimum tekstum á millum 10 og 15 reglur, ið skal geva eina mynd av mál- og skriviførleikanum hjá umsøkjaranum. Fyrst skal ein tekstur umsetast úr føroyskum til enskt. Harnæst skal ein tekstur umsetast úr føroyskum til danskt. At enda skal ein tekstur umsetast úr enskum til føroyskt. Tey lesandi hava atgongd til orðabøkur, eitt nú á alnetinum, undir loysnini av hesi uppgávu. Teksturin hevur ikki tekniskt ella vísindaligt mál, sum serlig vitan krevst til at skilja, men

teksturin kann innihalda sjónarmið ella grundgevingar, sum umsøkjarin má skilja fyri at vera før/ur fyri at umseta nøktandi.

Harnæst verður ein spurningur, ið skal vísa evnini til logiska og kritiska hugsan. Umsøkjarin verður tí biðin um at gera viðmerkingar til nøkur hugsað uppáhald og niðurstøður. Avgerandi er, at umsøkjarin dugir at avdúka styrkir og veikleikar í tí, sum verður pástaðið, og hugsunarháttinum, sum liggur aftanfyri.

Sum tað fjórða skal umsøkjarin loysa eina hugsaða ósemju ella eitt trupult mál frá gerandislívinum. Spurningurin krevur onga løgfrøðiliga ella aðra serliga vita. Kortini vilja evnini til at loysa gerandisligar avbjóðingar siga nakað um, hvussu búgvin umsøkjarin er í hugsunarhátti, sum er viðkomandi fyri løgfrøðiligt háttalag. Harumframt vil fjórði spurningur eisini krevja umsøkjaran at skriva so mikið, at ein mynd fæst av, hvussu umsøkjarin dugir at orða seg skrivliga á føroyskum, og hvussu væl hann ella hon dugir at grundgeva fyri sínum sjónarmiðum.

**Praktiskir upplýsingar**

Umsøkjarar, sum ætla til upptøkuroynd 29. juni, skulu melda til í seinasta lagi 23. juni, kl 12, á LSS@setur.fo.

Umsøkjarar skulu hava samleikaprógv við og egna farteldu og forleingjara til streym.

Uppgávuspurningarnir verða latnir í pappírsformi og á geyma.

Royndin verður dømd anonymt, har tey, sum rætta uppgávusvarini, ikki kenna samleikan á tí, sum hevur svarað, fyrr enn aftaná, at meting av próvtali er gjørd. Í sambandi við tilmelding fáa umsøkjarar tískil eitt nummar, sum skal skrivast á innlatingina. Nærri verður kunnað um tað í sambandi við tilmeldingina.

Uppgávan skal svarast á tí word-skjalinum, ið liggur á geymanum, ið umsøkjarin fær útleverað til royndina.

Umsøkjarin skal konvertera svarið til pdf áðrenn innlating, so sum frægast slepst undan trupulleikum við ymiskum teldum og telduforritum.

Uppgávusvarini skulu BÆÐI latast inn á nevnda geyma og EISINI sendast á teldupostadressuna LSS@setur.fo

Internet er loyvt, men samskifti við uttanfyristandandi er strangliga bannað og er burturvísingargrund.